## DAGSINS MEINING

# Gott íkast frá fakfeløgum

Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag høvdu í fyrradagin her í blaðnum drúgvar viðmerkingar til ætlaðu broytingarnar í MVG skipanini og í avgjaldskipanini sum heild. Tað kann staðfestast, at hesar viðmerkingar eru eitt seriøst og áhugavert íkast til orðaskiftið um skatta- og avgjaldsskipan okkara. Sum flestu lesarum kunnugt, so fyriliggur uppskot til rættiliga stórar broytingar í MVG skipanini. Viðmerkingarnar hjá nevndu fakfeløgum gera vart við tær álvarsomu sosialu avleiðingar, sum hesar broytingar fara at hava, um broytingarnar verða settar í verk. Tað er samstundis áhugavert, at feløgini eisini vísa á positivar avleiðingar við uppskotinum.

Feløgini vísa í viðmerkingum sínum serstakliga á negativu sosialu avleiðingarnar av MGV á arbeiðslønum og heilivági umframt av avgjøldum á brenniolju og ferðavgjaldi. Víst verður á, at MVG á arbeiðslønum fer at dýrka munandi um eini nýggj sethús. Arbeiðslønin til eini nýggj sethús liggur um 400-600.000 krónur. Hetta merkir, at nýggja uppskotið fer at dýrka eini vanlig nýggj sethús við 100-150.000 krónum. Hóast MVG á hvítavørum samstundis verður tikið av, so uppvegar hetta als ikki meirvirðisgjaldið á arbeiðslønunum. Uppskotið rakar tískil serstakliga tær ungu familjurnar, ið standa fyri at seta seg í búgv. Tað hevði verið ólíka skilabetri at brúkt MVG skipanina til at gjørt tað bíligari hjá teimum ungu at seta fót undir egið borð t.d. við ikki at havt MVG á arbeiðslønum og við at lækka MVG á hvítuvørum. Hetta hevði givið eina betri sosiala javnvág og hevði eggjað til meira byggivirksemi í eini støðu, har stórur vandi er fyri minkandi byggivirksemi. Her hongur ikki væl saman hjá Fíggjarmálaráðnum. Tað ber væl til at hava eitt sokallað differentierað MVG. Tað hava nógv lond. Tey hava t.d. ein sats fyri neyðsynjarvørur og ein annan sats fyri aðrar vørur og tænastur.

Í viðmerkingunum frá FA og HA verður sum nevnt eisini komið inn á heilivág, oljugjaldið og ferðaavgjaldið. Heilivágur er dýrur og mangan eru tað fólk, ið frammanundan eru illa fyri likamliga, sálarliga og fíggjarliga, ið nýta nógvan heilivág. Tað er tí beinleiðis ómoralskt og assosialt at nýta heilivág sum skattaevni. Hetta kann almenningurin als ikki góðtaka! So er tað brennioljugjaldið. Hetta gjald stavar frá tíðini við oljukreppuni. Endamálið var at savna pening í grunn til tess at minka um negativu avleiðingarnar av oljukreppuni. Nú er hetta gjald reinur skattur og hevur tí einki við upprunaliga endamálið at gera. Oljugjaldið er sera tyngjandi fyri pensionistar of barnafamiljur. Vit eru tí samd við HA og FA, at fortreytirnar fyri oljugaldinum eru burtur og átti landsstýrið tí at tikið avleiðingarnar av hesum veruleika. Feløgini gera at enda vart við løgnu grundgevingarnar fyri einum ferðavgjaldi. Endamálið er at "minka um hugin til uttanlandsferðing føroyinga" (citat). Hetta er, sum feløgini siga, "formyndarí av ringasta slag" og meira er ikki at siga um tað! Landsstýrið eigur at hugsa seg væl um, áðrenn hettan løgna uppskot verður lagt fyri Føroya Løgting. Tað er væl skiljandi, at leita verður eftir nýggjum inntøkum, nú tað fjarar í landskassanum. Men ansast má eftir sosialu javnvágini. Hetta landsstýrið setti gerandisdagin hjá Pallaba og Marsonnu á dagsskrá. Tað ræður um ikki at gloyma hesa dagsskrá, nú tann grái politiski gerandisdagurin er upprunnin fyri samgongu so væl sum fyri allar føroyingar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Bert eitt ungdómshús og dansur av og á munar lítið

**Bjørg Joensen,**
*Valevni Javnaðarfloksins til Tórshavnar Býráð*




Ein munagóð íløga hevði verið at bygt ungdómshús í nærumhvørvinum, har tey ungu búgva. Tað kann verða ein fyrimunur at ungdómshúsini verða har graslíkisvallir eru/koma, eitt nú í Kaldbak, á Løgmannabreyt, á Hamarinum á Argjum og á Norðasta Horni.

Tá vit vóru ung í 80 árunum, var einki í býnum fyri okkum. Hóast arbeiðsmarknaðurin og samfelagið, sum heild er nógv broytt og setir alt størri krøv til foreldrini og tey ungu, eru viðurskiftini hjá okkara ungdómi kortini nærum óbroytt.

At vera tannáringur er trupult - tað vita flestøll, um tey minnast afturá. Í hesum árunum er umráðandi, at ungdómurin aftaná skúlatíð og um kvøldarnar hevur nøkur frístøð í tryggum umhvørvi.

Í mínum barna- og ungdómsárum var fótbóltur mítt áhugamál burturav, og eg minnist enn, hvussu keðiligt tað var at hugsa sær eftir hvørja venjing, at ein heil vika var til næstu venjing! Tá vit hittast uttan fyri skúlan, meðan vit enn eru børn, mennast vit í felagsskapinum, og læra at virka saman við øðrum, og ikki minst, hvussu vit bera okkum at í samfelagnum.

Tey vinfólk, sum eg tá fekk, eru framvegis partur av mínum vinarskara.

Sum frístaður er Margarinfabrikkin góð fyrimynd, men tað er avmarkað, hvussu nógv kunnu fáa innivist. At onkur bjóðar teimum ungu niðan í Badmintonhøllina í dans av og á er heldur ikki nøktandi.

Tí haldi eg, at ein munagóð íløga hevði verið at bygt ungdómshús í nærumhvørvinum, har tey ungu búgva. Ein góð plasering kundi verið har graslíkisvallir eru/koma, eitt nú í Kaldbak, á Løgmannabreyt, á Hamarinum á Argjum og á Norðasta Horni.

Ungdómurin skal sleppa at gera sínar royndir, og sjálvur skipa fyri ymiskum ítrivum, við stuðli frá vaksnum fólki. Ungfólk dáma væl m.a. tónleik, sjónleik o.s.fr. og fleiri kundu tikið seg saman í áhugabólkar. Tað kundu verið fyrimunir við ymiskum frítíðarítrivum undir 'somu lon'. Kanska fingu tey í ítróttini smakk fyri at royna seg á øðrum kreativum økjum - og øvugt.

Foreldur raðfesta ungdómin hægst, tað eigur kommunan eisini at gera

Vit skulu tillaga kommununa eftir okkum, ikki øvugt.

# Fjáltur komin á býráðsformenn

**Jógvan Arge**
*Valevni Tjóðveldisfloksins til Tórshavnar Býráð*




Býráðsformenninar báðir tykjast bera ótta fyri, at ongin hevur lagt teir til merkis hesi fýra árini, teir hava stýrt Tórshavnar kommunu.

Óttist ikki. Fólk hava bæði sæð og merkt tykkara stýri og stýrislag.

Lógir og reglur hava verið luft fyri tykkum, og rættindini hjá borgarunum eru traðkað undir fót.

Góður fyrisitingarsiður hevur verið settur til viks, og lógin um alment innlit hevur ikki verið vird.

Ongin myndugleiki í Føroyum hevur verið fyri slíkum skortfleingjum frá umboðsmanninum sum Tórshavnar kommuna, meðan tit báðir hava havt teymarnar í tykkara hondum.

Byggimálini eru eisini ein serlig søga.

Einaferð loyvdu tit bygging av einum sethúsum á einum neystataki úti í Bakka, hóast byggisamtyktin ikki heimilaði tí.

Einaferð loyvdu tit eini heilari stovnsbygging í lendi, sum var lagt av til frítøki.

Einaferð loyvdu tit bygging av einum skúla í lendi, sum var avlagt sum grønt øki.

Hvat fólkið helt, løgdu tit líka á. Tit broyttu bara byggisamtyktinar, so tær passaðu í tykkara kramm.

Einaferð skuldu tit sprongja burtur av Tinganesi fyri at fáa pláss fyri skipunum.

Nú ein dagin skuldi grótbrotið á Glyvursnesi í óðum verkum gerast til tyrvingarpláss.

Jú, víst er nógv hent í Havnar Kommunu seinastu fýra árini. Sumt hevur verið til bata, men annað hevur verið til mikið fortreð.

So nógv, at sjálvt Jógvan við Keldu torir at biðja býráðsformannin í Havn koma út í Tinganes at standa skúlarætt.

Hetta vita fólk í Tórshavnar kommunu, og tey fara at minnast tað á valdegnum 9. november.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Drotningavitjanin í Japan 2004

**Eitt viðmerking til Edmund Joensen, løgtingsformann**

**Jóannes Eidesgaard**



Edmund Joensen, løgtingsformaður hevði í bløðunum fyrradagin eina grein, har hann viðgjørdi ætlaðu vitjanina hjá donsku drotningini og donskum vinnuumboðum í Japan. Hann segði, at hann helt, at landsstýrið hevði fingið innbjóðing til hesa ferð, men ivaðist í orsøkini til, at einki hoyrdist um føroyska luttøku.

Tað er rætt, at danska drotningin fer á vitjan í Japan við fylgi í november. Hetta er ein áhugaverd vitjan, har vinnulívið eisini hevur møguleika at vera á staðnum og soleiðis fáa nýggj sambond og handilsmøguleikar við japanar. Henda drotningavitjanin í Japan skuldi longu havt verið í 2003, men bleiv av ongum vegnað heilsubrek hjá drotningini.

2. juni 2004 fær Løgmansskrivstovan teldupost frá danska Uttaríkismálaráðnum um, at drotningavitjanin til Japans verður um miðan november 2004. Í hesum teldubrævi verður eisini sagt, at hava Føroyar ítøkilig áhugamál í Japan, kunnu Føroyar hava eitt umboð við í fylginum hjá drotningini. Vert er her at leggja til merkis, at talið av luttakarum í sjálvum fylginum hjá drotningi er avmarkað, men at esini umboð fyri vinnulívið hava møguleika at vera á staðnum.

Løgmansskrivstovan sendi málið til Vinnumálaráðið, Fiskimálaráðið og Mentamálaráðið til ummælis. Málið bleiv umvegis hesi umrøtt við vinnuna og onnur, og boðini Løgmansskrivstovan fekk aftur, var at eingi ítøkilig áhugamál eru í Japan í løtuni Soleiðis fall grundarlagið fyri at luttaka á drotningaferðini til Japans.

Løgmansskrivstovan og eg sjálvur hildu ferðina til Japans vera ein áhugaverdan møguleika. Men tá annar áhugi var so avmarkaður, gjørdu vit av ikki at fara.

24. august sendi Løgmansskrivstovan teldupost aftur til Uttanrískimálaráðið, har sagt verður: "Eg fari við hesum at boða tær frá, at løgmaður fer ikki at luttaka á drotningavitjanini á hesum sinni. Eg fari samstundis at gera vart við, at greiður politiskur áhugi er í Føroyum at luttaka í tílíkum vitjanum,og at tað er týdningarmikið, at Løgmansskrivstovan verður kunnað so skjótt skjøtil verður settur á at fyrireika næstu drotningavitjan ella krúnprinsavitjan í londum, sum mugu sigast at hava stóran búskaparligan týdning fyri Føroyar".

Annars eri eg púra samdur við Edmundi Joensen í, at vit skulu liggja framvið allastaðni, har møguleikar eru. Japan er fyri okkum eitt ótrúliga spennandi land. Teir virðismeta góðsku høgt og gjalda eisini fyri hana. Teir eru sera áhugaverdir í samband við útflutning av fiskavørum, og teir eru ikki minni áhugaverdir, tá tað snýr seg um granskingarsamstarv innan matvøruøkið og innan eitt nú biotøkni. Eisini átti Føroyar at verið eitt áhugavert ferðamál fyri japansk ferðafólk, sum ferðast so dúgliga í londunum rundan um okkum.

Eg haldi eins og løgtingsformaðurin ivaleyst eisini ger, at vitjanina hjá japanska sendiharranum her í Føroyum, vísti, at her liggja óbrúktir møguleikar á ymiskum økjum. So hetta mugu vit taka uppaftur í øðrum høpi.

# Færøsk antiabortlov undertrykker kvinder

**Af Hanne Bille**
*Forkvinde i Kvindeligt Selskab*



Hvert minut dør én kvinde i verden af graviditetsrelaterede årsager. Illegale aborter er her en stor kvindedræber. For godt 30 år siden døde danske kvinder efter rædselsvækkende aborter med strikkepindsmetoder. I dag tvinges ingen dansk kvinde til at gennemføre en livsfarlig abort eller en uønsket graviditet. De færøske kvinder gør. Flere gange om måneden rejser en kvinde til Danmark for at få del i vores rettigheder over egen krop. Forudsat at kvinden har råd og de har de ikke alle.

De færøske magthavere ved godt, at vi ikke reducerer eller afskaffer aborter ved at illegalisere dem og stikke hovedet i busken. Erkender de det, at den fri abort er en del af alle kvinders fundamentale rettigheder, redder de kvindeliv. Når en færøsk kvinde beslutter sig for at få en abort, legal eller ej, så har hun dybt ansvarligt overvejet sin egen psykosociale og økonomiske situation. Hun har ikke brug for fordømmelse, men derimod støtte. Man må forstå, at kvinder faktisk tager ansvar for deres egen krop og seksualitet. Derfor vil kvinden nogle gange vælge aborten, legal eller ej. I Danmark tog vi for 30 år siden konsekvensen, vi lod den enkelte kvinde afgøre, hvem hun vil have børn med, om hun vil have børn og hvornår.

Jeg bliver dybt krænket, når jeg hører eliten fremture med, at danske kvinder bruger den fri abort som prævention. Ikke alene er det dybt krænkende, det er også løgn. Den sandhed har det færøske folket krav på at vide, hvis det skal kalde sig et levende demokrati. Antallet af aborter i Danmark blev færre og færre efter den fri abort, og i dag er det lavere end nogensinde. Indtil nu er det argument forsøgt afsporet med modargumentet om dansk imperialisme i stedet for at føre den relevante, men meget ømtålelige debat om Færøerenes demokratiske situation og kvindernes rettigheder.

Når vi kæmper for ressourcesvage færøske kvinders rettigheder, er det fordi, vi er kvinder, feminister og demokrater. Ikke fordi vi er danskere, som nogen bruger som bekvemmeligheds-argument. Vi mener, at kvinders seksuelle og reproduktive rettigheder er ukrænkelige uanset religion, etnicitet og nationalitet. Ingen stat, intet mandsdomineret parlament har ret til at bestemme over kvindens krop og fastholde kvinderne i en underlegen position, så de ikke får mulighed for at gennemføre en uddannelse og blive økonomisk selvstændige.

Vi ved jo godt, at den manglende debat om abort skyldes, at de færøske mænd sidder på magtens stole. Kvindernes rettigheder bliver først et seriøst emne, når de får politisk indflydelse. Kun tre af Lagtingets 32 medlemmer er kvinder, og de tre støtter fri abort. Vi ved også, at danske kvinders indflydelse i samfundet tager et kvantespring, når vi er med til at træffe beslutninger, også om vores egen seksualitet og reproduktion. Om noget så personligt har mænd alene ganske enkelt ikke retten til at træffe beslutninger. Danske kvinder er økonomisk uafhængige, vi har et valg. Vi kan uddanne os og få indflydelse og vælge fra at være enlig teenagemor.

Resultatet er, at danske kvinder har langt større indflydelse end færøske, og det er måske lige netop tanken om kvinders indflydelse, der forskrækker nogle af de færøske abortmodstandere. En kvindes krop skal ikke underlægges viljen hos et parlamentarisk flertal. Beslutninger om et individs krop kan ikke kun afgøres af mandlige politikeres demokratiske flertal og den ressourcestærke elite. Det er udemokratisk.

# Omma vildi brennast!

**Elin Lindenskov, býráðslimur**
*Valevni Javnaðarfloksins*
*www.lindenskov.com*




Fleiri hava í seinastuni sett spurning fram um, vit áttu at fingið eitt krematorium í Føroyum. Sjálv eri eg uppvaksin við einar ommu, sum oftani tosaði um, at vit áttu at haft eitt krematorium í Føroyum. Hon sá kirkjugarðarnar sum oyðsl av góðari jørð. Omma segði oftani, at um eitt krematorium var her, so vildi hon brennast! Hon hevði eina systir, sum var gift í Danmark. Bæði systirin og maður hennara blivu brend. Tey hvíla nú í vøkrum kirkjugarði. Einasti munur á teirra grøv og teimum í Føroyum er, at hon er væl minni, enn gravirnar í Føroyum.

Eg kenni argumentini um, at krematorium kostar nógv, tí málið hevur verið frammið einaferð fyrr í Tórshavnar býráð. Eg ivist í, um tað er rætt. Sjálvandi kostar tað. Men tað kostar eisini at reka kirkjugarðarnar á tann hátt, vit hava teir. Tá krematorium bleiv umtalað í býráðnum seinast, vóru vit tveir býráðslimir, sum tóku greitt undir við at fáa eitt krematorium her. Fleiri vóru ímóti. Summi brúktu kostnaðin sum umbering, og onnur dámdu ikki tankan. Hetta er longu fleiri ár síðani, so har kann broyting vera komin í. Vit vita eisini, at tað tekur tíð at broyta siðvenju. Men tað ber væl til. Sambært Roskilde Krematorium ynskja 90 prosent av borgarunum í Roskilde at verða brendir, svarandi til 1200 - 1300 kistur um árið. Roskilde fekk krematorium í 1961.

Fyrsta treytin fyri at byrja at tosa um málið er at lýsa málið frá øllum síðum. Tá vit tosa um kostnaðin av einum krematorium, mugu vit eisini fáa at vita, hvat kirkjugarðurin kostar okkum, soleiðis sum vit hava hann í dag. Tá kann tað vísa seg, at hóast eitt krematorium kostar tíggjutals milliónir at byggja, so verður tað bíligari at brenna lík enn at grava tey niður. Eitt sindur óhugnaligt at hugsa um, men tað er vert at kanna. Omma hevði vilja verið brend - tað vil eg eisini!

# Einki mvg skal leggjast á

**Bjarti Mohr**
*býráðslimur, Fólkaflokkurin*




Ein arbeiðsbólkur undir Landsstýrinum er komin fram til at nú skal mvg leggjast á í samband við húsabygging. Hetta er ein skeiv niðurstøða at koma til og kemur eitt mvg gjald at fáa sera ringar avleiðingar fyri nógv fólk. Alivinnan er stórt sæð farin og við methøgum oljuprísum, minni fiskiveiðu og lágum fiskaprísum er longu steðgur komin í føroyska búskapin. Nógvar familjur merkja hesa afturgongd og eru tað serliga familjur sum ikki hava almenna løn at liva av. Eitt mvg avgjaldið á húsabygging kemur at skunda undir afturgongdina í búskapinum. Hetta rakar fyrst og fremst tær ungu familjurnar sum skulu seta búgv og tær familjuranr sum longu eru raktar av fallandi inntøkum í vinnulívinum.

Heldur enn at darva búskapinum við enn fleiri avgjøldum eiga bæði kommunur og landsstýri at stimbra búskapin við at seta arbeiðir í gongd og lækka skattin hjá borgarunum. Avgjøld hava ongantíð og koma ongantíð at skapa nakran framburð.

## Gjald fyri valgreinar

Nú kommunuvalið er lýst, og fleiri vallistar eru almannakunngjørdir, fara vit eins og til undanfarin val at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið fyri valgreinar er hálvur lýsingaprísur.

**Sosialurin**